## Hósdagur 25. oktober

### svf

18.30 Gloymdar leikur 11'
18.40 Jumanji 27'
19.05 Vesturleiðin til Vínlands (e)
20.00 Dagur og Vika við Grannum Okkara
20.50 Horvin 5:8 - donsk dokumentarsending
21.20 Ally McBeal 9 - am. røð
22.05 Roomservice - íbúðin verður broytt
22.30 Krimitímin: Dalziel og Pascoe 2:2 - ensk krimirøð
23.25 Liðugt

### eurosport.com

07:30 Sailing
08:00 Car Racing
08:30 Equestrianism
09:30 Golf
10:00 Tennis
11:30 Tennis
13:00 Tennis (Live)
17:00 News
17:15 Tennis (Live)
20:00 Boxing
22:00 News
22:15 Football
00:15 News
00:30 Close

### BBC PRIME

0.00 TLZ: »The Argentinian Journey – The Gaucho & The Pampas«
1.00 TLZ: »Century of Flight – Anyone can Fly«
2.00 TLZ: »Open Advice - Study to Succeed«
2.30 TLZ: »Picasso's Guernica«
2.55 TLZ: »Mind Bites«
3.00 TLZ: »Chardin and the Still Life«
3.25 TLZ: »Pause«
3.30 TLZ: »Restoring the Balance«
3.55 TLZ: »Bites – Science Bites – No Broken Bones«
4.00 TLZ: »Troubleshooter – Charge the Guns«
4.40 TLZ: »Landmarks – Tudors and Stewarts – Elizabeth I«
5.00 TLZ: »Greek Language & Peopl – Ordering a Meal«
5.30 TLZ: »Teen English Zone«
6.00 Playdays: »The Whybird Stop«
6.20 The Really Wild Show: »South Africa«
6.45 Kitchen Invaders
7.15 Antonio Carluccio' S Southern Italian Fe: »Lazio«
7.45 Real Rooms
8.15 Going for a Song
8.45 Style Challenge: »Ramblers«
9.15 Zoo
9.45 Vets In Practice: »Better out than in«
10.15 The Weakest Link
11.00 Doctor Who: »The Twin Dilemma«
11.30 Classic Eastenders
12.00 Eastenders
12.30 Hetty Wainthropp Investigates: »Lost Chords«
13.25 Kitchen Invaders
13.55 Style Challenge: »Rally Drivers«
14.25 Toucan Tecs: »Prickly Problems«
14.35 Playdays: »The Whybird Stop«
14.55 The Really Wild Show: »South Africa«
15.20 Totp Eurochart
15.50 Great Antiques Hunt: »Tunbridge Wells«
16.20 Ground Force: »Portmellon Bay Cornwall«
16.50 Miss Marple: »A Murder is Announced«
17.45 The Weakest Link
18.30 Doctors
19.00 Eastenders
19.30 Murder most Horrid: »Girl from Ipanema«
20.00 Aristocrats
21.00 Big Train
21.30 A History of Britain: »Conquest«
22.30 Living with the Enemy: »Travellers«
23.00 Maisie Raine: »Happy Families«

### BBC WORLD

0:00 BBC News
0:30 HARDtalk (r)
1:00 BBC News
1:30 Holiday (r)
2:00 BBC News
2:30 Albania: Back From The Brink (r)
3:00 BBC News
3:30 Asia Today (r)
3:45 World Business Report (r)
4:00 BBC News
4:30 HARDtalk
5:00 BBC News
5:30 World Business Report
6:00 BBC News
6:30 World Business Report
7:00 BBC News
7:30 World Business Report
7:45 Sport Today
8:00 BBC News
8:30 Talking Movies (r)
9:00 BBC News
9:30 HARDtalk (r)
10:00 BBC News
10:30 Holiday (r)
11:00 BBC News
11:30 Simpson's World (r)
12:00 BBC News
12:30 HARDtalk (r)
13:00 BBC News
13:30 World Business Report
13:45 Sport Today
14:00 BBC News
14:30 Top Gear (r)
15:00 BBC News
15:30 Simpson's World (r)
16:00 BBC News
16:30 Asia Today
17:00 BBC News
17:15 World Business Report
17:30 Talking Movies (r)
18:00 BBC News
18:30 World Business Report
18:45 Sport Today
19:00 BBC News
19:30 HARDtalk (r)
20:00 BBC News
20:30 Click Online
21:00 BBC News
21:30 World Business Report
22:00 BBC News
22:30 Life
23:00 BBC News
23:30 World Business Report (r)
23:45 Asia Today

### 3

05:00 Børne-hjørnet med Disney
07:00 TV-shop
08:00 Panter-tanter(G)
08:25 Ricki Lake (G)
09:15 Ricki Lake
10:10 Horton-sagaen(G)
11:00 Horton-sagaen
11:50 Blossom(G)
12:20 Panter-tanter
12:50 Vild med dig
13:20 Pæn pige - sej sild
13:45 Baywatch Hawaii(G)
14:40 Blossom
15:10 Min kære familie
15:40 Baywatch Hawaii
16:35 Ricki Lake
17:30 Alle tiders barnepige
18:00 Felicity
19:00 Robinson - Talkshow
20:00 Seernes Favorit
21:25 Tve-kampen(G)
22:25 Vore værste år
22:55 Simpsons
23:25 Ricki Lake(G)
00:25 Drøm videre
01:00 Vore værste år (G)
01:30 Simpsons(G)
02:00 Sunset Beach
02:45 Godnat

### ÚF

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur, Uni Næs, prestur, lesur
07.15 Barnaløtan, Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
07.30 Tíðindi
07.35 Morgunrásin, Hilmar Jan Hansen og Kári Olsen leggja til rættis
08.00 Tíðindi
08.03 Morgunrásin
09.00 Tíðindi
09.03 Sjónarringurin (e), Árni Joensen leggur til rættis
09.35 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e), Uni Næs, prestur, lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 3
10.10 Tit skriva, vit spæla, Øssur Egholm skipar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum (e), Gunnvør Poulsen leggur til rættis
11.35 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Fimmarin (e), Helgi Jacobsen leggur til rættis
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt, Tróndur Vatnhamar velur løgini
16.00 Tíðindi
16.03 Bitar úr Billboard, Rúni Jákupsson stílar fyri
17.00 Tíðindi
17.05 Í víngarðinum, Victor Carlsen leggur til rættis
18.00 Barnaløtan (e), Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Skiftissiðir á lívsleiðini : Um dópin, Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Tónleikur
20.30 www.kærleiki.fo, Stuttsøga eftir Heidi Vágsá. Páll Danielsen lesur. Søgan er úr stuttsøgukappingini hjá Listastevnu Føroya.
21.00 Tíðindi
21.10 Dagsetur, Øssur Egholm leggur til rættis
22.00 Ljóðmúrurin, Regin Egholm stílar fyri
23.00 Tíðindi

## Skiftissiðir á lívsleiðini : Um dópin

ÚF Hóskvøldið kl. 19.00

Ymisk fólk siga frá siðum, sum eru tengdir at dópinum. Farið verður aftur í gamla tíð, tá børnini vanliga vórðu doypt fáar dagar gomul og ofta vórðu flutt langa leið um fjøll ella við báti til kirkju. Eisini verður nortið við, hvussu ymiskir siðirnir vóru úr Suðuroy til Norðoyggjar.

Sagt verður somuleiðis frá fyribrigdinum kirkjugangskona. Hetta var kona, sum varð leidd í kirkjuna, eftir at hon hevði átt. Hóskvøldið klokkan 19.00.

*Armgarð Arge leggur til rættis.*

## Vesturleiðin til Vínlands (e)




Í sendingini sigla vit túsund ár aftur í tíðina, og leggja inn í víkina, har Leivur Hepni tók land í Vínlandi. Í fjør summar vóru teir tríggir føroyingarnir Páll Poulsen, Leif Niclasen og Zacharias Hammer staddir í Nýfundlandi. Hetta var júst á 1000 ára haldinum fyri at Leivur Hepni við sínum monnum kom til Vínland og reisti búgv norðaliga í Nýfundlandi - í dag nevnt Leifsbúðir. Teir tríggir vitjaðu hetta søguliga pláss. Í dag síggjast leivdirnar eftir gomlu búsetingini hjá norðbúgvunum, eitt stórt víkingasavn er bygt á staðnum og eini langhús við úthúsum er reist í sama sniði sum gomlu víkingalonirnar. Eitt víkingaskip siglur við ferðafólki á víkini uttan fyri Leifsbúðir. Í samband við 1000 ára haldið hevur kanadiska stjórnin latið byggja eina lítla víkingabygd.

Í sendingini fer Leif Niclasen, sum er fyrrverandi skipsførari, at greiða frá, hvussu víkingarnir kundu sigla longu leiðina um Norðurhøv uttan klokku, kumpass og logg. Páll Poulsen, ið hevur stóran áhuga fyri søgu og ferðunum hjá gomlu norðbúgvunum, greiðir frá ferðini hjá Leivi Hepna til Vínlands og øðrum søguligum tilfari um víkingarnar, tá teir tóku land í Grønlandi og Vínlandi.

*Lagt til rættis: Zacharias Hammer. Fotografur: Zacharias Hammer, DR. Klipt: Bjarnheðin í Hoyvík og Zacharias Hammer.*

## Veljið filmin

Í kvøld verður møguligt at velja hvønn film, hyggjararnir vilja síggja. Valið er millum: Kærlighed og tømmermænd (The Money Pit) frá 1986 við Tom Hanks og Shelley Long í høvuðsleiklutunum. Stjerner uden hjerner frá 1997 við Timm Vladimir og Gordon Kennedy í høvuðsleiklutunum. Hetta er ein danskur skemtilfilmur við tveimum kendum donskum sjónleikarum í høvuðsleiklutunum. Beethoven frá 1992.
Tað ber til at atkvøða á telefonnummar 38 38 35 00




### Rás 2

09:45 Orðið, Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10:00 Leysaløtan (e), Endursending frá í gjár. Innsløg, prát og tónleikur. Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
11:00 Tónleikur
12:00 Tíðindi og kunngerðir
12:15 Tónleikur
13:00 Ynskiløtan, Heilsanir frá lurtarum. Sunneva Petersen er vertur. Send heilsanir um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990.
14:00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan (framhald)
15:00 Tíðindi og kunngerðir
15:15 Leysaløtan, Innsløg, prát og tónleikur. Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
16:00 Tónleikur
17:00 Norðlýsið, Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík. John William og Oliver Joensen leggja til rættis
18:00 Tíðindi og kunngerðir
18:15 Tónleikur
19:00 Orð á leiðini (EvR), Andaligur búnaðskapur: "Hvussu biði eg?" (1. partur av 2). Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19:40 Tónleikur
21:00 Tíðindi og kunngerðir
21:15 Orðið (e), Endursending frá í morgun. Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Tónleikur
22:00 Girlzone, Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo
00:00 Liðugt

13.00 Byrjan – Dagsskráin verður lisin
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin Vitin v/ Símun Hansen (e)
14.30 Tónleikur fyri børn
15.00 Tónleikur
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
20.30 Okkara dagliga breyð
20.40 Lýsingar fyri møtir ið verða í vikuskiftinum.
20.55 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti (e)
21.00 Bønarlinjan við gesti, vertur er Jenis av Rana, Bønarevnu kunnu ringjast inn frá kl. 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379
Vit gevast uml. middnátt

# ítróttur

Nr. 202 • fríggjadagur • 19. oktober 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

**Tveir fuglfirðingar til Zwolle**

Síða 28

# Tætt við at koppa Wales



*U-landsliðið hjá Føroyum megnaði at spæla javnt móti Wales, og nú hava teir ein søguligan møguleika at spæla seg víðari í undankappingini*

## U-17 dreingirnir skulu í kvøld spæla finalu um at halda fram í EM kappingini

EM U–17 LANDSLIÐ
*Jóannes Hansen*

Tað er lagt upp til finalu, tá Føroyar og Sveis í kvøld fara at spæla U–17 landsdyst í EM undankappingini, sum í hesi vikuni hevur verið í Sveis.

– Dysturin verður fríggjakvøld, og teir í sveisiska fótbóltssambandinum rokna við, at tað fara at koma millum tvey og trý túsund fólk. Tá Sveis og Wales spældu fyrsta dystin mánadagin vóru tað 1150 áskoðarar.

Tað er Jógvan Martin Olsen, sum er í telefonini úr Sveis. Hann er høvuðsungdómsvenjari hjá FSF, og saman við venjaranum og hjálparvenjaranum hjá hesum liðnum, Mathiasi Davidsen og Bill Jacobsen, og hinum í ferðalagnum var hann sjálvandi sera fegin eftir 1–1 dystin mikukvøldið.

– Vit eru greiðir yvir, at mótstøðan verður størri fríggjakvøldið. Ferðalagið úr Føroyum kom niður higar týsdagin. Mánakvøldið vann Sveis 3–0 á Wales. Bill Jacobsen fór ein dag undan okkum niður higar. Hann sá tann dystin, og hann sigur, at Sveis kundi havt vunnið uppaftur meiri. Men tað vóru veikleikar í verjupartinum hjá Sveis. Wales hevði tveir stórar møguleikar at fáa mál, áðrenn Sveis fekk fyrsta málið. Men eingin ivi er um, at tað verður strevið.

### Rasmus er sum Beckham

Tað var stórur fjáltur á føroysku dreingjunum í fyrra umfarinum mikukvøldið. Teir høvdu ilt við at fóta sær á eitt sindur óslætta og tunga vøllinum. Smáspælið, sum teir annars eru so kringir í, hekk ikki saman, og teir vóru undir trýsti frá walisunum. Men tað var ikki soleiðis, at Wales hevði nógvar upplagdar málmøguleikar. Føroyska verjan stóð seg væl, og walisiska liðið vísti ikki nakað hugflog. Teir royndu at oysa høgar bóltar fram til miðframherjan, sum var vandamikil. Í borðunum megnaðu teir ikki at bjóða av ein ímóti einum, og eitt tvey samanspælið var einki at rópa hurrá fyri hjá teimum.

Í 2. hálvleiki spældi føroyska liðið meiri frígjørt. Teir javnaðu, tá umfarið bara var tríggjar minuttir gamalt, og tað var vorðið sum mál í besta David Beckham stíli hjá syni Ásmund Nolsøe, sum fyri einari fjórðingsøld síðani saman við tvíburðabeiggjanum Tróndi var við til at mynda hugflogsríka álopsspælið hjá TB:

– Miðverjin Rasmus Nolsøe sendi fríspark úr 35 metrum og upp í málhornið. Hetta er ikki fyrsta ferðin, at hann skorar sovorðin mál á landsliðnum. Tá teir í august vóru í NM kappingini í Vejle, skoraði Rasmus tvær ferðir upp á fríspark úr stórari fjartsøðu. Í 2–2 javnleikinum ímóti Íslandi og sigursmálið í 2–1 dystinum ímóti Finnlandi, minnir Jógvan Martin Olsen á. Hann harmast um, at tað mikukvøldið ikki eydnaðist at fáa sigursmálið:

– Vit hava ofta tapt í síðstu løtu. Um vit vóru hepnir hesa ferð, so fingu vit sigursmálið í yvirtíðini. Jósup Henriksen sneiddi seg leysan av tveimum í vinstru og smekkaði flatt innfyri, og Bergur Midjord var akkurát ov seinur at stýra bóltinum í málið.

### Fínur árgangur

Uttan mun til hvussu tað fer at hilnast í kvøld ímóti Sveis, so boða úrslitini frá, at hetta liðið hevur staðið seg serliga væl.

– Mathias Davidsen hevur gjørt eitt stórt arbeiðið. Liðið er javnt gott. Góða samanhaldið bæði á og uttanfyri vøllin eru stórar styrkir, og dreingirnir hava sjálvsálitið, sum skal til fyri at spæla og ikki sparka fótbólt. Hóast kappingin í Føroyum er liðug fyri einum mánað síðani, so eru teir konditionelt sera væl fyri. Venjarin hevur havt teir saman í nógv vikuskifti, og tvey tey seinastu vikuskiftini hava teir spælt fýra venjingardystir ímóti U–19 landsliðnum, sigur Jógvan Martin Olsen.

Í føroysku leguni í Sveis harmast teir um, at besti spælarin í hesum árganginum ikki er við í Sveis. Tað er miðvallarin Ingi Højsted, sum er sáttmálabundin at Arsenal. Tá NM kappingin fyrstu vikuna av august var í Danmark varð hann skaddur. Nú er hann um at koma fyri seg aftur, men hann var ikki nóg væl fyri at fara úr Arsenal og til Sveis at hjálpa føroyska liðnum.

Liðið sá soleiðis út mikukvøldið: Gunnar Nielsen, HB – Jústinus R. Hansen, NSÍ, Rasmus Nolsøe, TB, Eli Thorsteinsson, HB, Jónas Þór Næs, B36 – Bárður H. Joensen, HB (Bergur Midjord, B36, 65.), Símun Samuelsen, VB, Marni Djurhuus, EB-/Streymur, Magnus Skoralíð, GÍ (Hanus Thorleifsson, Skáli, 60.) – Jóhan Petur Olsen, B68 (Jósup Henriksen, KÍ, 74.), Rókur Jespersen, liðformaður, HB

Á beinkinum uttan at verða skiftir inn sótu Páll M. Joensen, HB, Búgvi Øster, EB/Streymur, Allan Kjærbo, VB og Poul N. Poulsen, VB. Pætur Clementsen er liðleiðari, og Anna Jónsson er fysioterapeutur.